# Landsbyggiskipan anno 2006

KARL M. SIMONSEN
arkitektur, Århus

Tað er gleðiligt at hoyra um allar teir byggiaktivitetir, ið ætlanin er at fremja í Tórshavnar kommunu. Sambært fjølmiðlunum skal byggjast ein nýggj býareind í Hoyvíkshaganum, nakrar marglætisíbúðir úti á Boðanesi og ein heldur stór býlingaeind úti á Argjum.

Grundarlagið fyri hesum er at stimbra umhvørvi í høvuðsstaðnum við at byggja nøkur háhús og í hesum sambandi gera ein miðdepil við alskyns handils- og aktivitetshølum, soleiðis at býareindin í sær sjálvum verður ein »bygd« í sjálvum býinum.

Eingin ivi kann vera um, at tað er neyðugt at nøkta tørvin á teimum støðum, har arbeiði er og fólk hava hug at búgva. Tó má ásannast, at tað er neyðugt at vera sera umhugsin og síggja tiltøkini í einum størri landsligum perspektivi. At høvuðsstaðurin er og verður staðið, har tey flestu ynskja at búgva, er eingin loyna. At hann hevur neyðugu orkuna, ein nøkulunda góðan infrastruktur og enntá upplendi til tiltøkini, er vælsignað í sær sjálvum. Við hesum spretta møguleikar fyri, at grøn økir inni í býnum fáa frið, sosum gamlar træðir, kirkjugarðar og viðarvøkstur. Møguliga vil ein stórur partur av óneyðugari ferðslu eisini minka og eitt lítið grundarlag verður fyri, at miðbýurin aftur kann blíva tann rætti miðdepilin fyri øllum.

Gleðin og nøgdin fyri hesum tiltøkum má hita eitthvørt hjarta og síggja góðar vónir fyri framman. At hugsa sær, at tað enn finnast dygdarfolk, ið hava visiónir og orku til at fáa síni sjónarmið framd? At tað enn finnast knotur, ið geva gætur og við hjálpsemi veita framtíðar ungdómi og enntá teimum gomlu húsarúmd ella tak yvir høvdið.

Tá hetta er sagt, vil onkur óivað halda, at hetta ikki riggar rætt og kann als ikki vera allur sannleikin aftan fyri tiltøkunum? Hví hugsa soleiðis, tá ið vit vita, at landið eigur nógv gott og kreativt fólk, eisini arkitektar? Men pappírið er nú einaferð takksamt, hugsjónir ymiskar og slørnan kann mangan vera í valsinum. Sjálvt um tú teknar vakurt, litar við alskyns akvarellum og enntá nýtir telduanimatiónir, ið loyvir tær at spáka í nøkrum myndum, ið ikki er veruleiki og enn minni eftirfarandi, hava vit øll lyndi til at læta okkum manipulera av hesum.

Tíverri kann eg ikki sjálvur síggja nøkur kvalitetsbrek ella banalitetir í sambandi við teimum ávísu ætlanum, tí listiligi framferðarhátturin er eins reikandi, ið hann altíð hevur verið… Tí er tað neyvan nakar, ið spyr seg sjálvan, um hetta er tað ynskiliga ein kann fáa av tí allarstørsta byggitiltakinum í hesi øld? Vága vit yvirhøvur nøkrum fáum yrkislærdum ta stóru ábyrgd, ið teldumús teirra vil finna av glas- og betongtilfari til eitt bastant discountbyggjarí í kaldari konceptmodernismu? Er tað yvirhøvur ynskjandi, at alt komandi ættarlið skal búgva og virka í Havnini???

Alla aðrastaðni er tíðin komin, har dentur verður lagdur á góðsku, ístaðin fyri mongd. Hetta er væl kent innan fyri ídnað, men tá talan er um bygging og serstakliga skipanin av henni, sær tað heldur dapurt út. Skommin sæst væl og tískil eru menn farnir at hugsa seg um og royna at bøta um misgerðirnar. Hava vit hug til at gera tað sama og stimbra okkara byggihátt; eins og at vit síggja og útinna bygging sum eina heildarskipan fyri alt landið.

Nú Klaksvíkin er holføst við Eysturoynna, ganga tíðindi um, at næsti teinur verður ímillum úr Eysturoynni til Suðurstreym. Verður vegakervið eisini útbygt oman fyri Runavík og til Gøtu, eins og ein nýggjur flogvøllur verður á Glyvursnesi, vil støðan verða ein heilt onnur.

Um so er, eru eisini slóðbrótandi alternativir til staðar og tískil mugu teir fólkavaldu og teirra hjálparfólk ikki frítakast fyri teirra ábyrgd í sambandi við byggiætlanirnar í Havnini og í landinum í síni heild… Lætt er bara at kritisera og tískil má eg tó siga, at eg síggi nógv áhugavert við ætlaðu tiltøkum, men sakni eina størri heild, har orkuveitingar, vegakerv og strukturur eru inni í myndini. Eingin loyna er tó, at filosofar hugsa djúpt og málvísandi, men eitt er at hava góðar gávur, eitt annað er at nýta ágóðan rætt ella hóskandi.

# Løgmaður og visión 2015

REIDAR NÓNFJALL



Í sendingini Føroyar í dag, týskvøldið tann 6. juni 06, kom løgmaður við nøkrum endurgevingum av einari samrøðu millum meg og Sosialin, sum eru beinleiðis skeivar og villeiðandi.

Eg eri ikki komin við einum kollektivum dómi yvir leiðslur og starvsfólk í føroyska vinnulívinum ella almenna sektorinum. Tað sum eg segði varð, at tey, sum eru inkompetent, eiga at skiftast út, og tað standi eg fast við.

Eg eri ikki ímóti strategiskum og visiónerum arbeiði og tað stendur eisini týðuliga og greitt í samrøðuni. Tvørturímótu havi eg drúgvar royndir innan hetta økið, bæði fakliga og í praksis - so har hevur løgmaður onki at tilføra mær av vitan.

Tað er langt úti, at løgmaður tosar um, at mín innfalsvinkul til strategiska arbeiði, sum í hesum ítøkjuliga føri er ein upprudding í 3 ár, svarar til at tosa um eina visión til 3015. Politiska skipanin í Føroyum hevur ikki arbeitt málrættað við framtíðini í 15 ár, so eg dugi ikki at síggja nakran truplleika at rudda verður upp í 3 ár og dagligi raksturin framdur við síðuna av.

Um so var, at løgmaður visti, hvussu ótrúliga nógvar positivar viðmerkingar eg havi fingið til samrøðuna og míni sjónarmið, so hevði hann ikki fari so lætt um hetta álvarsliga evnið og útihýst sakligum og objektivum kritikki av verkætlanini visión 2015.

Tað er lætt politiskt at fáa undirtøku fyri nøkrum, sum bara eru leysar hugsanir og ætlanir, og har ikki ein einasta avgerð ella handling enn er tikin.

# Løgtingsumsitingin arbeiðir ímóti samtyktum

RÚNA SIVERTSEN



**…og løgtingsfólk vita eftir øllum at døma ikki, hvat tey sjálvi hava verið við til at samtykt**

Sambært Sosialinum í gjár hevur løgtingsskivstovustjórin sagt, at tað als ikki kom upp á tal at senda aðrar kvinnur á kvinnupolitiska ráðstevnu enn tær, sum sita í løgtinginum. Grundgevingin skal hava verið, at ráðstevnan bert er ætlað kvinnuligum parlamentarikarum.

### Ikki rætt!

Tann 18. november 1999 samtykti Føroya Løgting við stórum meiriluta eitt uppskot til samtyktar um at taka undir við eini tilráðing hjá Útnorðurráðnum. Tað vóru 28 tingfólk á tingi tann dagin. 27 atkvøddu fyri, ein var ímóti og eingin atkvøddi blankt.

Í tilráðingini, sum løgtingið samtykti at taka undir við, stendur millum annað:

”Vestnordisk Råd godkender den fremlagte rekommandation om at Rådet henstiller til Altinget, Landstinget og Lagtinget, at der afholdes seminarer for kvindelige parlamentarikere i de vestnordiske lande, samt repræsentanter for ligestillingsudvalg/råd, kvindeorganisationer og evt. andre, der beskæftiger sig med ligestilling. Seminarerne bør have som formål at kvindelige politikere kan udveksle idéer og erfaringer og styrke samarbejdet. Seminarerne skal holdes hvert andet år på skift i de tre lande. Finansiering skal afsættes på finansloven til udgifterne i forbindelse med seminarerne i de respektive landi.”

### Einki at taka feil av:

Løgtingið hevur samtykt at taka undir við tilráðingini hjá Útnorðurráðnum. Tilráðingin er, at seminar skal haldast fyri kvinnuligar tinglimir, umframt umboð fyri javnstøðunevndum, kvinnufelagsskapum og møguliga øðrum, sum arbeiða við javnstøðu.

Seminarini skulu haldast annað hvørt ár, og

# Blokkstuðulin hjá Johan Petersen helst

## meira vandamikil enn hann hugsar

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður



**Kann tykjast eitt sindur troystasleyst, at vit í Føroyum ikki eru komin longur á leið**

Í fjølmiðlunum seinastu viku nevndi eg, at ”tað eru veik, naiv og einkisigandi uppáhald, at útbyggingar kring landið, so sum tunlar og vegir, hava skuldina av, at Føroyar eru í aftara enda, har fólkaskúlafrálæran liggur í vanlagnu, at eldrapolitikkur er skeivur og at miðmánmsskúlar, fróðskaparsetur og aðrir hámettir stovnar hava ov lítlan pening”.

Samstundis setti eg spurningin, av teirri orsøk, at hesi altíð tørva pening: ”Hava tey intelektuellu tosað allan kvalitet til deyðis?”

Henda grein fekk Johan Petersen í Dimmalætting 2. juni og í Sosialnum 7. Juni at royna enn einaferð at staðfesta, at ”Jógvan og teir gloyma blokkniðurskurðin”.

Nú skal eg ikki svara fyri onnur, men sjálvandi havi eg ikki gloymt blokkniðurskurðin.

Hinvegin havi eg, sum so mangir aðrir føroyingar, lagt mær í geyma og fingið søgulig prógv fyri eftir áralongum politiskum virki, at tørvurin á peningi hjá einum sosialistlíknandi móttakaralandi verður ongantíð mettaður, heldur ikki um blokkstuðulin tvífaldaðist.

### Euforiserandi evni

Haldi eisini, eg fari at nevna, at sambandsáhugaðir føroyingar hava síðani 1944 sagt við jøvnum millumbilum, at ”Ísland fer falitt”. Hvat kann staðfestast, jú, vit eru farnir á húsagang, meðan Ísland er harri í Norðuratlantshavi. Sjálvandi hava teir havt síni rak ár sum øll onnur lond, men teir hava yvirliva við egnum lógum og egnum leisti.

Nei, tað er sum danskur politikari tók til, at: ”Stuðulsskipanir eru sum euforiserandi evni, tað kennist væl, men til endans doyr tú av tí”. – Hetta tykist troystasleyst, at Føroyar ikki eru komnar longur á leið.

Løgið kennist, at Johan Petersen skal koma við stuðulinum úr danska landskassnum, um eg mótmæli, at ”møguliga hava tey intelektuellu tosa allan kvalitet til deyðis, meðan vit hava útbygt okkara undirstøðukervi, sum savnar landið, og sum gevur óánaðar møguleikar, og geva útbyggingunum skuldina fyri, at vit liggja í aftara enda á nevndu økjum!”
www.keldu.com
keldu@post.olivant.fo

